## Sigfríður til EB/Streym

EB/Streymur hevur skrivað undir sáttmála við Sigfríða Clementsen og Magna Mohr, um at teir komandi kappingarár skulu venja besta lið felagsins. Hetta stendur at lesa á almennu heimasíðuni hjá EB/Streymi, og formaður felagsins, Rólant Højsted, váttar somuleiðis tíðindini. Rólant Højsted sigur, at tá Magni Mohr í løtuni arbeiðir í Danmark, kemur hann at arbeiða sum ráðgevi fyrstu tíðina. Somuleiðis sigur hann, at Finnbjørn Zachariassen er settur sum hjálparvenjari. Hetta eru góð tíðindi í Sundalagnum, eftir at tað herfyri gjørdist greitt, at EB/Streymur og venjarin seinastu mongu árini, Piotr Krakowski, ikki fóru at halda fram við samstarvinum.



## Tevez royndarvenur í United

Miguel Tevez, sum er bróður at kenda fótbóltsspælaranum, Carlos Tevez, hevur seinastu 14 dagarnar verið og royndarvant í enska stórfelagnum, Manchester United, har bróður hansara eisini spælir fótbólt. Og venjarin hjá Manchester United, Alex Ferguson, er imponeraður. Hann heldur Tevez, sum er offensivur miðvallari, vera ein sera góðan spælara, men av tí at Tevez hevur longst illa heim, hevur Ferguson gjørt av at senda hann aftur til felag sítt Boca Juniors, men Ferguson hevur givið United boð um at halda eyga við Tevez.

Neistin – Stjørnan 18-28 (7-14)

# Stjørnan vann trygt á Neistanum

**Stjørnan er nú einasta ósigraða liðið í Sunset-kappingini hjá kvinnum, eftir at tær vunnu ein knúsandi 10-mála sigur á útivølli ímóti Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt satt brak í Sunset-kappingini hjá kvinnum, tá Neistin tók ímóti Stjørnuni í høllini á hálsi sunnudagin. Undan dystinum høvdu bæði Neistin og Stjørnan vunnið allar sínar dystir í bestu kvinnudeildini, og harafturat eru hetta liðini, sum hava ligið og kappast um fremstu plássini tey bæði síðstu árini.



*Stjørnan vann ein greiðan sigur í toppdystinum í Sunset-kappingini ímóti Neistanum, og við sigrinum eru tær nú einasta liðið við fullum stigatali*

### Stjørnan leyp avstað

Sjálvt um nógv helst høvdu bíðað í spenningi eftir júst hesum dystinum, so gekk tó ikki long tíð, fyrrenn spenningurin var at kalla burtur. Tað var nevniliga Stjørnan, sum enn eina ferð setti seg á dystin alt fyri eitt, og um miðjan fyrra hálvleik høvdu kvinnurnar úr Klaksvík lagt seg á odda 9-4. Her vóru greiðar ábendingar um, at Stjørnan enn eina ferð fór at vinna trygt ímóti Neistanum.

Eftir hetta valdið Neistin at taka eitt Time Out, og sjálvt um Stjørnan enn sat á dystinum eftir hetta, so tóktist Neistin at vera heldur betri við.

Síðstu løtuna undan steðginum vóru tað tvær góðar verjur, sum merktu dystin, men tað var tó enn Stjørnan, sum hevði lættari við at finna vegin til málið. Tær megnaðu eisini at økja nakað um munin, so tá liðini fóru til hálvleiks, førdi Stjørnan við sjey málum, 14-7.

### Stjørnan avgjørdi

Seinni hálvleikur var heldur ikki serliga gamal, áðrenn Stjørnan endaliga hevði avgjørt dystin. Fyrstu fimm minuttirnar skoraðu tær trìggjar ferðir á rað, meðan Neistin einki mál fekk, og tí vóru nú brádliga 10 mál á muni, og tað lá í luftini, at dysturin kundi enda við stórsigri til gestirnar.

Hetta vildi Neistin tó ikki hava sitandi á sær. Tað, ið eftir var av dystinum, kempaði heimaliðið alt tað, tær vóru mentar, og nú megnaðu tær eisini at spæla upp ímóti Stjørnuni.

Síðstu 25 minuttirnar av dystinum fingu liðini nevniliga 11 mál í part, so tá dómarin bríksłaði fyri seinastu ferð, vísti talvan 18-28 til Stjørnuna. Við sigrinum eru kvinnurnar úr Klaksvík enn ósigraðar í bestu deildini, meðan Neistin mátti taka til takkar við sínum fyrsta tapi.

### FAKTA

**Neistin – Stjørnan 18-28 (7-14)**
**Málskjúttar**
**Neistin**: Rakul Magnussen 4 (3), Raul Augustinussen 4, Anja Heinadóttir 3, Elin Stakksund 2, Nicoleta R. Hansen 2, Unn Kragesten 2, Katrin á Neystabø 1
**Stjørnan**: Simona Petersen 10 (4), Bára S. Klakkstein 5, Joan Djordjevic 5, Una Olsen 5, Durita Christophersen 2, Anna Kristina Samson 1
**Brotskøst**: Neistin 5, Stjørnan 4
**Útvísingar**: Neistin 2, Stjørnan 4
**Dómarar**: Sámal Paulason & Kári Hansen

VÍF – Kyndil 21-24 (10-14)

# Kyndil vann í Vestmanna

**Við sera góðum spælið beint eftir steðgin megnaðu kvinnurnar hjá Kyndli at vinna á VÍF í Sunset-kappingini sunnudagin**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til ein spennandi dyst í høllini í Vestmanna sunnudagin, tá ið bestu kvinnuliðið hjá VÍF og Kyndli brustu saman. Undan dystinum lógu liðini jøvn í stigum við einum stigi á stigatalvuni, og tí var stórur møguleiki fyri, at annað av liðunum fór at fáa sín fyrsta sigur í kappingarárinum.

Sum stigatalvan eisini segði frá, so var byrjanin á dystinum sera jøvn. Kyndil fekk fyrstu tvey málini, men skjótt høvdu kvinnurnar úr Vestmanna aftur skapt javnvág í. So skiftust liðini um at skjóta mál, og á vøllinum sást heldur ikki serliga stórur munur á liðunum.

Tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin, stóð enn á jøvnum, 6-6, men brádliga tók dysturin eina ordiliga vend. Nú var tað nevniliga Kyndil, sum setti seg á dystin.

### Kyndil vísti gott spæl

Síðstu hálvuna av fyrra hálvleiki vísti Kyndil væl betri spæl enn VÍF. Tær øktu nú støðugt um munin, og VÍF tóktist nú brádliga at hava ávísar trupulleikar framman fyri eini vælleikandi kyndilsverju. Samstundis sum verjan hjá Kyndli koyrdi væl, so fekk álopið eisini skorað tey neyðugu málini, so tá liðini fóru til hálvleiks, førdi Kyndil 14-10.

Men tær grønu vóru ikki lidnar enn. Fyrstu løtuna av seinnia hálvleiki skoraðu tær nevniliga seks ferðir, meðan VÍF bert fekk eitt mál, so tá góðir 10 minuttir vóru farnir eftir stegðin, var Kyndil nú á odda heili 20-11, og dysturin var avgjørdur.

### VÍF pyntaði um úrslitið

Í høllini í Vestmanna vóru tey flestu greið yvir, at dysturin nú var avgjørdur. Men heimaliðið vísti tó góðan vilja síðstu løtuna av dystinum. Teir royndu at kempa víðari, og sjálvt um spenningur ongantíð kom í dystin, so var heildarmyndin tó ikki so heilt galin av heimaliðnum, tá ið dysturin var liðugur.

Tær tóku eitt mál fyri og annað eftir inn á Kyndil síðstu 20 minuttirnar, og tá ið dysturin bleiv liðugur, vóru bert trý mál á muni millum liðini. Tað var Kyndil, sum vann dystin 24-21, og við sigrinum fingu tær sostatt sín fyrsta sigur í ár.

### FAKTA

**VÍF – Kyndil 21-24 (10-14)**
**Málskjúttar**
**VÍF**: Ioana Rapa 7 (1), Fríða Marjunardóttir 4, Heidi Joensen 3 (2), Marita Johannesen 2, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Linda Johannesen 2, Elisa Leo 1
**Kyndil**: Súsanna Petersen 8 (2), Tordis Tróndarson 6, Lina Andriulyte 5, Jórun Ludvig 2, Barbara Egilstrøð 1, Ása Apol 1, Eydna Apol 1
**Útvísingar**: VÍF 2, Kyndil 4
**Brotskøst**: VÍF 3, Kyndil 3
**Dómarar**: Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen